Kommunufelagið

Heilsu- og innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Dagfesting
29. januar 2019

Okkara j.nr.
19/00360-3

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr.
19/00038-2

**Viðv. *Uppskoti til løgtingslóg um heilsutænastur í nærumhvørvinum***

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur 17. januar 2019 sent Kommunufelagnum *uppskot til løgtingslóg um heilsutænastur í nærumhvørvinum* til hoyringar.

Sum skrivað stendur í fylgiskrivinum til uppskotið, er største nýbrotið í lógaruppskotinum um heilsutænastur í nærumhvørvinum, at landið yvirtekur allar skyldurnar, sum kommunurnar hava sambært lógini um kommunulæknaskipanina. Hetta merkir, at hereftir verður landið einasti ábyrgdarhavari í kommunulæknaskipanini.

Sambært sama fylgiskrivi skal hetta vera við til at veita borgarum eina betri heilsutænastu í nærumhvørvinum, enn møguleiki er fyri undir verandi skipan. Við hesi broyting fer eisini at kunna bera til at gagnnýta avmarkaða starvsfólkatilfeingið og fíggjarliga tilfeingið í heilsu-verkinum sum heild skilabetri, enn møguleiki er fyri, sum er.

**Viðmerkingar frá felagnum**

Uppgávan hjá kommununum eru sambært galdandi lóggávu, at útvega, rinda og bera raksturin av viðtaluhølunum við neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum til kommunulæknan. Somuleiðis skulu kommunurnar útvega frían bústað til frítíðar- og langtíðar avloysarar.

Tað er ein sannroynd, at flest allar kommunur, einsæris ella í samstarvi við aðrar, væl og virðiliga hava liva upp til tær skyldur, sum tær hava sambært lógini um kommunu-læknaskipanina. Nógvar kommunalar íløgur eru gjørdar í viðtaluhøli og heilsudeplar seinastu árini, umframt at ætlanir eru um íløgur í komandi árum. Somuleiðis hava kommunurnar sýnt kommunulæknunum stóra vælvild í sambandi við  at útvega tól og innbúgv, eins og bústað v.m.

Uppgávan hjá landinum fevnir fyrst og fremst um setanar- og lønarviðurskiftini hjá kommunu-læknum, frítíðar- og langtíðaravloysarum, umframt onnur starvsfólk í viðtalum við avloysarum.
Tað er eingin loyna, at tað er í hesum parti av kommunulæknaskipanini, at størstu trupulleikarnir hava verið. Høvuðsavbjóðingin er stóra trotið á kommunulæknum. Tey seinnu nógvu árini hevur tað verið sera trupult at fáa kommunulæknar settar í fast starv. Í flestu

økjum í Føroyum eru kommunulæknastørvini ikki fullmannað í føst størv, og tískil verða viðtalurnar mannaðar við skiftandi avloysarum. Hetta er sjálvsagt ikki nøktandi, hvørki fyri sjúklingarnar og avvarðandi, ella fyri kommunulæknarnar sjálvar.

Kommunurnar hava í øllum førum gjørt sítt til at veita kommunulæknum nøktandi umstøður. Stórar íløgur eru gjørdar, júst tí at kommunurnar síggja týdningin og virðismeta at hava eina væl virkandi heilsutænastu í sínum nærumhvørvi.

Kommunurnar kenna seg ikki sannførdar um, at landið við fullari ábyrgd fyri økinum kemur at fjálga um og gera íløgur í kommunulæknaskipanina á sama hátt, sum kommunurnar hava gjørt tað higartil. Hinvegin bera kommunurnar ótta fyri, at gjørdar íløgur ikki fara at verða gagnnýttar, og at heilsutænasturnar í nærumhvørvinum hvørva og verða miðsavnaðar.

Tá ið hetta er sagt, so eru kommunurnar ikki á einum máli um, hvørt samlaða skipanin liggur best hjá landinum, ella eigur at halda áfram við verandi ábyrgdarbýti, ella møguliga eigur at verða løgd til kommunurnar burturav. Verandi uppgávubýti gevur ávísar trupulleikar. T.d. eru nógv ivamál um, hvørjar skyldur kommunurnar hava í mun til innbúgv og tól í viðtaluhølunum, hvørjar skyldurnar eru mótvegis læknum í føstum starvi ávikavist avloysarum, hvør hevur ábyrgdina av KT trygdini í viðtaluhølunum v.m. Hetta eru trupulleikar, sum helst høvdu verðið einfaldari at loyst, um ábyrgdin av skipanini bert lá hjá einum geira.

**Samanumtikið**

Kommunufelagið tekur sjálvsagt undir við meginregluni um greitt ábyrgdarbýti, og metir at eitthvørt málsøki sum útgangsstøði verður best rikið, tá ið ábyrgdin liggur hjá einum geira heldur enn tveimum. Hetta ger seg eisini galdandi fyri kommunulæknaskipanina.

Hinvegin er ilt at síggja, hvussu fyriliggjandi uppskot skal loysa veruliga trupulleikan á kommunulæknaøkinum, nevniliga tilgongdina av kommunulæknum. Vandi er fyri, at við hesum uppskotinum heldur verandi trupulleiki fram, bara í øðrum bygnaði. Í øðrum lagi óttast fleiri av limakommununum, at gjørdar íløgur fara fyri skeyti.

Kommunufelagið er tó altíð til reiðar at umrøða broytingar í verandi skipan, sum kann virka øllum økjum í Føroyum og øllum borgarum landsins at frama.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri